


## Arkitektar og byggifrøðingar til Selmar Nielsen Arkitektar

# Set tíni fingramerki á framtíðina

**Vit standa á gáttini til nakrar spennandi byggiverkætlanir, sum eru eindømi í føroyskari byggisøgu. Virksemið økist nógv, og tí leita vit eftir arkitektum og byggifrøðingum, ið vilja seta síni fingramerki á føroyska byggilist**







Stóratjørn og íbúðabyggingin Undir Kongavarða eru tvær einastandandi verkætlanir, sum hvør í sínum lagi fara at mynda framtíðina og seta sín dám á livihátt føroyinga. Tær hava tað til felags, at tær skulu byggjast komandi 6-ára skeiðið, og at Selmar Nielsen Arkitektur hevur prosjekteringina um hendi.

Til hesar og aðrar uppgávur krevjast fleiri dugnaligir arkitektar og byggifrøðingar – bæði royndir og minni royndir – til leiðsluuppgávur, prosjektering, eftirlit og skitsering.

**Arkitektar**
Vit sóknast eftir fólki við dyggum royndum í prosjektleiðslu. Viðkomandi kemur at standa á odda fyri bygningsverkætlanum og skal sjálvstøðugt megna at stýra mongu træðrunum í umfatandi arbeiðsuppgávum.

Harafturat verður søkt eftir arkitektum, sum eru dugnaligir, hugsjónarríkir og kreativir.

Vit rokna við, at umsøkjarar hava royndir frá teknistovum, men hevur tú nýliga fingið tína útbúgving og brennir fyri at royna tíni evni, ert tú eisini vælkomin at søkja.

**Byggifrøðingar**
Søkt verður eftir byggifrøðingum til prosjektering og eftirlitsarbeiði. Tað er eitt krav, at umsøkjarar duga at tekna í Auto-Cad og Architectural Desktop.

Vit vænta, at tú hevur eitt breitt tøkniligt innlit, haldgóðar royndir frá teknistovu og stóran áhuga fyri bygningsarbeiði. Hevur tú aðra hóskandi útbúgving ella royndir, ert tú eisini vælkomin at søkja.

**Møguleikar og eginleikar**
Teknistovan er grundað á eldhugað starvsfólk, sum hava stórt frælsi undir ábyrgd. Tónin er léttur og óformligur, men álvarsemið mótvegis uppgávunum er treytaleyst. Á teknistovuni arbeiða í dag arkitektar, byggifrøðingar og býarplanleggjarar.

Altjóða samstarv er partur av dagliga arbeiðinum. Vit kunnu bjóða fjølbroyttar og avbjóðandi uppgávur, góðar menningarmøguleikar og trygg setanarviðurskifti.

Vit rokna við, at tú ert opin og fyrikomandi. Tú arbeiðir sjálvstøðugt, setir teg skjótt inn í fløktar spurningar og dugir væl at samskifta.
Vit vænta, at tú gert tær sjálvstøðugar meiningar, sum tær dámar at leggja fyri onnur.

**Umsókn og freist**
Hevur hetta tín áhuga, kanst tú senda eina umsókn við prógvum, lívsrensli (CV) og viðmælum innan mánadagin 19. mars til:

Selmar Nielsen Arkitektur
Landavegur 9
FO-100 Tórshavn

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Um tú hevur spurningar, kanst tú ringja á telefon 354812 og spyrja eftir Selmari Nielsen.

**Selmar Nielsen Arkitektur**

Landavegur 9, 100 Tórshavn
Tel 35 48 12, www.sna.fo